Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00733-10
Málsviðgjørt:	HP
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk
(Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum broytt við løgtingslóg 142 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 138 frá 16. desember 2015, løgtingslóg nr. 132 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 76 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 103 frá 13. juli 2017 og løgtingslóg nr. 152 frá 12. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 3, nr. 1 og 2 verður "§ 9 í forsorgarlógini" broytt til: "§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur"

2. § 7, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Persónur, ið luttekur í virknisvenjing, fær framhaldandi stuðulsveiting sbrt. § 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.".

3. Í § 12, stk. 1, nr. 1-6 og í § 13 a, stk. 1, nr. 1-7 verður "dagpeningaupphæddini um mánaðin" broytt til: "hægstu uppihaldsveiting".

4. § 12, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Hægsta uppihaldsveiting sbrt. hesi løgtingslóg er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Sambúgvandi er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni."

5. § 12, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4*. Persónur, sum vegna týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum má hava ávísan bústað og harvið hægri

bústaðarútreiðslur, kann, umframt veitingina sbrt. stk. 1, § 13 a, stk. 1 ella § 14, stk. 1, fáa fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslur."

6. Í § 13 a, stk. 1, nr. 8-9 verður "dagpeningaupphæddini" broytt til: "hægstu uppihaldsveiting".

7. Í § 16, stk. 2 verður "§ 9 í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

8. Í § 19, stk. 1 verður "§ 12 ella 14" broytt til: "§§ 12, 13 a ella 14".

9. Í § 19, stk. 2 verður "§ 15 í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 19 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

10. Í § 19, stk. 3 verður "§ 18 b í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 29 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

11. § 22 verður orðað soleiðis:

"**§ 22.** Lønarískoyti sbrt. § 21 er í mesta lagi 18.552 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald sbrt. løgtingslóg um eftirløn.
Stk. 2. Arbeiðsgevarin rindar løn sbrt. viðkomandi sáttmála fyri arbeiðstíðina, sum arbeiðsavrikið hjá viðkomandi løntakara verður mett at samsvara við. Lønarískoyti verður veitt sum endurgjald fyri lønarmiss orsakað av minkaða arbeiðsførleikanum.
Stk. 3. Hægsta lønarískoyti verður veitt, tá arbeiðsgevari rindar 2.000 kr. um mánaðin í løn. Lønarískoytið verður lækkað við 40% av inntøku frá arbeiðsgevaranum oman fyri upphæddina á 2.000 kr.
Stk. 4. Løn og lønarískoyti tilsamans kann ikki vera hægri enn løn sbrt. viðkomandi sáttmála samsvarandi við starvsbrøkin, sum viðkomandi arbeiddi frammanundan.
Stk. 5. Við løn sbrt. stk. 4 er ikki at skilja løn hjá fyritíðarpensjónisti, sum fer í tillagað starv sbrt. treytum í § 3, stk. 1, pkt. 1.
Stk. 6. Lønarískoytið fellur burtur, tá tað er lægri enn 1/5 av upphæddini sbrt. stk. 1.
Stk. 7. Um persónur hevur aðra lønarinntøku, enn avtalað, fellur lønarískoytið burtur. Inntøka frá kommunalari ella borgarligari umboðan er tó ikki at rokna sum lønarinntøka.
Stk. 8. Upphæddir sbrt. stk. 1 og 3 verða javnaðar sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

12. § 23, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Almannaverkið metir um minkaða arbeiðsførleikan og ásetir lønarískoytið við støði í væntaðari lønarinntøku frá arbeiðsgevara. Lønarískoytið verður ásett fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið, sbr. tó stk. 3. Almannaverkið rindar lønarískoyti beinleiðis til arbeiðstakaran og frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald eftir galdandi reglum."

13. Í § 23 verða aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 3.* Almannaverkið hevur eftirlit við, at tann løn, sum arbeiðsgevarin rindar, samsvarar við tann brøk, sum arbeiðstakarin er mettur at vera skerdur og tekur mál upp til nýggja viðgerð, um ósamsvar er millum ta løn, sum arbeiðsgevarin rindar, og arbeiðstakari er mettur at vera skerdur.
Stk. 4. Tað er ein treyt fyri at fáa lønarískoyti, at arbeiðstakarin er í framhaldandi starvi, og at Almannaverkið hevur eftirlit."
Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 5-7.

14. Í § 26, stk. 2 verður "sambært § 9 í forsorgarlógini vegna arbeiðsloysi

uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga" broytt til: "vegna arbeiðsloysi sbrt. § 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, uttan mun til ogn".

15. Í § 27, stk. 1 verður "§ 9 í lóg um almenna forsorg uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga" broytt til: "§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, uttan mun til ogn".

16. Í § 36 verður "Kærunevndina í almanna- og heilsumálum" broytt til: "Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.
Stk. 2. Persónur, sum er í tillagaðum ella vardum starvi, áðrenn henda løgtingslóg fær gildi, fær lønarískoyti eftir higartil galdandi reglum. Tó verður áseting og eftirlit framt eftir ásetingunum í § 23, stk. 2 og 3, og lønarískoytið kann ikki vera hægri enn 19.900 kr. um mánaðin.
Stk. 3. Fer persónur í tillagaðum ella vardum starvi eftir higartil galdandi reglum í annað ella nýtt tillagað starv, verður tað viðgjørt eftir reglunum í hesi løgtingslóg.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið er liður í ætlanini hjá landsstýrinum at tálma útreiðsluvøkstrinum á fíggjarlógini fyri 2021. Útreiðslurnar til tillagað størv eru øktar munandi í fleiri ár á rað. Síðstu trý árini eru útreiðslurnar í miðal øktar við meira enn 14 mió. kr. um árið. Fíggjarnevndin hevur í sambandi við fíggjarlógararbeiðið á hvørjum árið lækkað metingarnar hjá landsstýrismanninum, eins og tað á hvørjum ári hevur verið tørvur á eykajáttan til tillagað størv. Uppskotið hevur tí við sær nøkur útreiðslutálmandi átøk.

Uppihaldsveitingar til persónar í arbeiðsbúgving eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verða javnaðar øðrvísi enn flest allar aðrar almannaveitingar. Við tíðini kann tað hava við sær, at sambandið millum ymsu veitingarsløgini skeiklast. Uppskotið hevur sostatt við sær, at javningin av veitingum til arbeiðsbúgving verða javnaðar eins og aðrar almannaveitingar.

Harumframt er tørvur á nøkrum broytingum av tekniskum slag. T.d. í sambandi við, at nýggja lógin um almannatrygd og tænastur verður sett í gildi tann 1. januar 2021, samstundis sum forsorgarlógin verður sett úr gildi, eru tilvísingar, ið skulu broytast og einstakar orðingar tillagast.

1.2. Galdandi lóggáva

Tillagað starv

Tillagað starv er ein fyriskipan á vanliga arbeiðsmarknaðinum, har persónar við varandi skerdum arbeiðsførleika kunnu fáa eitt ískoyti til lønina. Fyri at fáa rætt til tillagað starv skal arbeiðsførið vera varandi minkað við í minsta lagi 1/3.

Skipanin við tillagaðum størvum kom í gildi 1. januar 2013, og kom hetta í staðin fyri skipanina við vardum størvum. Tey, sum tá vóru í vardum starvi, kundu tó halda fram óbroytt. Enn eru uml. 50 fólk í vardum starvi, meðan talið av tillagðum størvum í august 2020 er umleið 325.

Inntøkan hjá persóni í tillagaðum starvi er vanliga full sáttmálaløn. Meginreglan er, at arbeiðsgevari rindar sáttmálaásetta løn fyri arbeiðsavrikið, sum persónur í tillagaðum starvi leggur eftir seg á arbeiðsplássinum, meðan Almannaverkið rindar tað, sum manglar í upp til fulla sáttmálaløn. Lønarískoytið kann tó ikki vera hægri enn 22.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og eftirlønargjald.

Um ein persónur hevur eina sáttmálaløn á t.d. 30.000 kr. um mánaðin, og hann verður mettur at hava arbeiðsføri svarandi til 1/3, tá rindar arbeiðsgevarin 1/3 av lønini svarandi til 10.000 kr., meðan Almannaverkið rindar 20.000 kr. Sostatt er samlaða inntøka hansara 30.000 kr. svarandi til sáttmálaløn.

Skipanin er soleiðis sett saman, at tá arbeiðsførið minkar, og løntakarin arbeiðir minni, tá rindar arbeiðsgevarin minni í løn, og hetta hevur samstundis við sær, at parturin hjá Almannaverkinum hækkar.

Tað er eitt undantak, har persónum ikki er tryggjað fulla sáttmálaløn. Tað eru persónar, sum áðrenn tey blivu sjúk arbeiddu niðursetta tíð. Persónur, sum vanliga hevur arbeitt niðursetta

tíð, og sum sostatt eisini hevur fingið niðursetta løn, fer ikki upp í inntøku, tá viðkomandi verður varandi sjúkur og fær játtað tillagað starv.

Tá eitt tillagað starv er sett á stovn, og persónurin er byrjaður í starvi, er umsitingin av tí avmarkað. Men tað eru eisini nøkur størv, sum eru umsitingarliga tung. Talan er um persónar við skiftandi inntøku. Tað kann vera tímalønt ella persónar, ið arbeiða í vaktum, ella sum hava árstíðarbundið arbeiði.

Javning av veitingum til arbeiðsbúgving
Flestu almannaveitingar verða javnaðar sbrt. løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Tó hava uppihaldsveitingar eftir forsorgarlógini og veitingar eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verið tengdar at lønarsáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Tað merkir, at tá arbeiðslønin t.d. hækkar við 2,5%, tá hækka uppihaldsveitingarnar eisini við 2,5%.

Tað eru persónar, sum eru í arbeiðsbúgving, sum fáa uppihaldsveiting eftir løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Arbeiðsbúgving er til persónar, sum hava varandi skerdan arbeiðsførleika, og sum fáa fíggjarligan stuðul frá Almannaverkinum t.d. í sambandi við útbúgving ella arbeiðsroynd.

Nýggja løgtingslógin um almannatrygd og tænastur verður sett í gildi 1. januar 2021, og samstundis verður forsorgarlógin sett úr gildi. Við nýggju lógini verða uppihaldsveitingar (fyrrverandi veitingar eftir forsorgarlógini) javnaðar eftir løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Sostatt eru bara veitingar eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum blíva javnaðar sbrt. lønarsáttmála.

Um javningin er ymisk millum ymsu veitingarsløgini kann sambandið millum veitingarnar við tíðini skeiklast. Veitingarnar til arbeiðsbúgving eru upprunaliga settar umleið 10 % hægri enn forsorgarveitingar, og hægstu veitingarnar til arbeiðsbúgving eru umleið á støði við miðal fyritíðarpensjón.

Broytingar av tekniskum slag
Í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verður í fleiri førum víst til forsorgarlógina. Forsorgarlógin verður sett úr gildi við ársskiftið 2020-21, samstundis sum nýggja løgtingslógin um almannatrygd og tænastur verður sett í gildi.

Í løgtingslógini um almannatrygd og tænastur eru einstakar ásetingar broyttar, sum hava við sær, at tørvur er á konsekvensbroytingum í løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Eisini er tørvur á einstøkum tekniskum broytingum, sum ikki hava ávirkan á rættindi hjá borgarum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið hevur trý høvuðsendamál. Málini eru at tálma útreiðsluvøkstrinum í fíggjarlógini, at javning av almannaveitingum verður meira eins, umframt tekniskar broytingar.

Uppskotið inniheldur fleiri ymiskar broytingar, sum ikki eru tengdar at hvørji aðrari. Broytingarnar verða viðgjørdar hvør sær niðanfyri.

Lækking av hægst møguliga lønarískoyti
Øll verandi tillagað størv – t.v.s. tey, sum áðrenn hendan lógin kemur í gildi eru í tillagaðum starvi – halda fram óbroytt. Tó verður hægst møguliga lønarískoyti lækkað úr 22.000 kr. niður til 19.900 kr. um mánaðin.

Tá upphæddin er sett til júst 19.900 kr. merkir tað, at ongin persónur í tillagaðum starvi hevur inntøku, sum er lægri enn ein tímaløntur, sum arbeiðir fulla tíð sbrt. sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag (grundløn). Undantikið er tó tey, sum vanliga hava arbeitt niðursetta tíð – eisini áðrenn tey blivu sjúk. Hesi halda fram við somu inntøku sum áðrenn.

Dømi 1 um lækking av lønarískoyti
Persónur við arbeiðsføri á 50%, og sum hevur sáttmálaløn á 40.000 kr. um mánaðin

	Løn frá arbeiðsg.	**Lønarískoyti**	**Inntøka tilsamans**
Áðrenn broyting	20.000 kr.	20.000 kr.	40.000 kr.
Aftaná broyting	20.000 kr.	19.900 kr.	39.900 kr.

Dømi 2 um lækking av lønarískoyti
Persónur við arbeiðsføri á 40%, og sum hevur sáttmálaløn á 45.000 kr. um mánaðin

	Løn frá arbeiðsg.	**Lønarískoyti**	**Inntøka tilsamans**
Áðrenn broyting	18.000 kr.	22.000 kr.	40.000 kr.
Aftaná broyting	18.000 kr.	19.900 kr.	37.900 kr.

Dømi 3 um lækking av lønarískoyti
Persónur við arbeiðsføri á 10%, og sum hevur sáttmálaløn á 25.000 kr. um mánaðin

	Løn frá arbeiðsg.	**Lønarískoyti**	**Inntøka tilsamans**
Áðrenn broyting	2.500 kr.	22.000 kr.	24.500 kr.
Aftaná broyting	2.500 kr.	19.900 kr.	22.400 kr.

Nýggj skipan við tillagaðum størvum
Ein broytt skipan við tillagaðum størvum verður galdandi fyri mál, sum verða játtað aftaná ársskiftið 2020-21. Endamálið er at fáa eina fíggjarliga skynsamari skipan, sum ikki avmarkar tilgongdina til tillagað størv, og sum hóast tálmandi endamálið er ein góð inntøkutrygging til tey, sum hava varandi skert arbeiðsføri. Persónur í tillagaðum starvi er tryggjaður í minsta lagi eina fulla arbeiðsmannaløn (undantikið tey, sum vanliga hava arbeitt niðursetta tíð). Tey flestu fara tó at hava eina inntøku, sum er nakað hægri enn tað. Broytingin fer eisini at hava við sær, at persónar við heilt høgum inntøkum ikki fara at fáa lønarískoyti.

Broytta skipanin verður áleið tann sama, sum varð galdandi frá 2013-2017 við smærri tillagingum. Skipanin, sum tá var galdandi, var umsitingarliga tung fyri arbeiðsgevarar, men hetta er við hesum uppskoti beint av vegnum. Treytirnar fyri arbeiðsgevarar verða annars óbroyttar, og persónskarin verður tann sami. Sostatt verða treytirnar fyri at fáa játtað tillagað starv óbroyttar.

Talan er um ein grundleggjandi øðrvísi hátt at rokna lønarískoyti. Í dag er tað soleiðis, arbeiðsgevarin rindar sín part, og Almannaverkið veitir lønarískoyti upp til sáttmálaløn. Frameftir verður lønarískoyti ásett til 18.552 kr., men lækkar stigvíst, sum inntøkan hækkar.

Talan er um eitt slag av mótrokning. Lønarískoytið lækkar við 40 % av inntøku frá arbeiðsgevara, sum er hægri enn 2.000 kr.

Um inntøkan frá arbeiðsgevara t.d. er 12.000 kr., tá lækkar lønarískoytið soleiðis:

40 % av (12.000 minus 2.000) = 4.000 kr.

Lønarískoyti á 18.552 kr. lækkar við 4.000 kr. og verður sostatt 14.552 kr. Inntøkan hjá viðkomandi verður sostatt arbeiðsløn frá arbeiðsgevara á 12.000 kr. + lønarískoyti á 14.552 kr., samanlagt 26.552 kr.


Frameftir verður tað soleiðis, at persónar við lægstu lønini fáa hægsta almenna stuðulin, meðan tey við hægstu lønini fáa lægsta stuðulin.

Dømi nýtt tillagað starv
Tveir persónar, sum báðir hava 50% arbeiðsføri. Persónur 1 hevur sáttmálaløn á 30.000 kr., og persónur 2 hevur sáttmálaløn á 40.000 kr.:
Persónur 1 hevur løn frá arbeiðsgevara á 15.000 kr. (50% av 30.000) og lønarískoyti á 13.350 kr. Inntøkan tilsamans er 15.000 + 13.350 = 28.350 kr.
Persónur 2 hevur løn frá arbeiðsgevara á 20.000 kr. (50% av 40.000) og lønarískoyti á 11.350 kr. Inntøkan tilsamans er 20.000 + 11.350 kr. = 31.350 kr.

Sama dømi sum omanfyri við verandi skipan
Persónur 1 hevur løn frá arbeiðsgevara á 15.000 kr. og lønarískoyti á 15.000 kr.
Persónur 2 hevur løn frá arbeiðsgevara á 20.000 kr. og lønarískoyti á 20.000 kr.

Dømini omanfyri vísa, at við verandi skipan hevur tann við høgari løn hægri lønarískoyti enn tann við lágari løn. Broytta skipanin vendir hesum á høvdið, tí tann við lágari løn fær hægri lønarískoyti enn tann við høgari løn.

Broytta skipanin við tillagaðum størvum er lýst í myndini niðanfyri.



Myndin omanfyri vísir, at um ein persónur í tillagaðum starvi økir um sítt arbeiðsavrik ella onkursvegna fær hægri løn, tá hækkar inntøkan hjá viðkomandi, samstundis sum lønarískoytið frá landinum lækkar.

Yvirlit yvir løn frá arbeiðsgevara og lønarískoyti

Arb. gevara-partur	Lønarískoyti	Skattskyldug inntøka
undir 2.000	-	-
2.000	18.552	**20.552**
3.000	18.152	**21.152**
4.000	17.752	**21.752**
5.000	17.352	**22.352**
6.000	16.952	**22.952**
7.000	16.552	**23.552**
8.000	16.152	**24.152**
9.000	15.752	**24.752**
10.000	15.352	**25.352**
11.000	14.952	**25.952**
12.000	14.552	**26.552**
13.000	14.152	**27.152**
14.000	13.752	**27.752**
15.000	13.352	**28.352**
16.000	12.952	**28.952**
17.000	12.552	**29.552**
18.000	12.152	**30.152**
19.000	11.752	**30.752**
20.000	11.352	**31.352**
21.000	10.952	**31.952**
22.000	10.552	**32.552**
23.000	10.152	**33.152**
24.000	9.752	**33.752**
25.000	9.352	**34.352**
26.000	8.952	**34.952**
27.000	8.552	**35.552**
28.000	8.152	**36.152**
29.000	7.752	**36.752**
30.000	7.352	**37.352**
31.000	6.952	**37.952**
32.000	6.552	**38.552**
33.000	6.152	**39.152**
34.000	5.752	**39.752**
35.000	5.352	**40.352**
36.000	4.952	**40.952**
37.000	4.552	**41.552**
38.000	4.152	**42.152**
39.000	3.752	**42.752**
40.000	-	

Uppskotið hevur við sær, at persónar í tillagaðum starvi í flestu førum koma at hava eina skattskylduga inntøku millum uml. 22.000 kr. og upp til uml. 39.000 kr. Tey, sum vanliga hava arbeitt niðursetta tíð, eisini áðrenn tey fingu skert arbeiðsføri, kunnu tó ikki fara upp í inntøku, tá tey flyta til tillagað starv. Hesi kunnu tí hava lægri inntøku enn 22.000 kr. Men hetta er eisini galdandi í verandi skipan. Er skattskylduga inntøkan hægri enn uml. 39.000 kr. dettur lønarískoytið burtur. Tað er út frá eini ásannan av, at persónur, sum hevur somikið høga inntøku, ikki skal hava almenna stuðul aftrat inntøkuni.

Broytt javning av veitingum til arbeiðsbúgving
Frameftir verða veitingar sbrt. løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk javnaðar á sama hátt sum flest allar aðrar almannaveitingar. Veitingarnar verða javnaðar við prosentsatsinum, sum er ásettur í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Broytingar av tekniskum slag
Nýggja løgtingslógin um almannatrygd og tænastur kemur í gildi 1. januar 2021, og tí verða nakrar tilvísingar broyttar í løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Neyðugt er við nøkrum konsekvensbroytingum eins og einstakar orðingar gera lógina greiðari.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær hesar broytingar:

- Verandi tillagað størv halda fram óbroytt. Tó lækkar hægst møguliga lønarískoyti úr 22.000 kr. um mánaðin niður til 19.900 kr.,
- Broytt skipan við tillagaðum størvum. Hetta verður bert galdandi fyri nýggj mál. Nýggju málini hava eitt hægst møguligt lønarískoyti á 18.552 kr. um mánaðin,
- Broytt javning av veitingum til arbeiðsbúgving. Javningin verður sbrt. løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum,
- Broytingar av tekniskum slag.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2021, og tað hava ikki verið stundir at senda uppskotið til ummælis.

Tað hava heldur ikki verið stundir at umrøða uppskotið við aðrar partar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lækking av hægst møguliga lønaríkoyti

Tað verða umleið 50-55 persónar, sum fara at fáa lægri veiting. Lækkingin verður uml. 1.400 kr. um mánaðin í miðal, umframt ein lítil lækking í eftirlønargjaldi og arbeiðsmarknaðargjøldum. Sparingin fyri landskassan verður sostatt umleið 1 mió. kr.

Nýggj skipan við tillagaðum størvum

Talan er um eina fíggjarliga skynsamari skipan, men broytingin verður bert galdandi fyri nýggj mál, og tí verður sparingin fyrsta árið avmarkað. Tað verða játtað uml. 30-40 nýggj tillagað størv um árið, harav leysliga mett eini 40 % fáa lægri veiting, enn við higartil galdandi skipan. Fyrsta árið væntast sparingin fyri landskassan leysliga mett at blíva 500 tús. kr. Sparingin fyri landskassan økist við tíðini.

Broytt javning av veitingum til arbeiðsbúgving

Undir vanligum umstøðum høvdu veitingarnar hækkað tann 1. mai 2021, tá lønin sbrt. sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag hækkar við 1,25%. Í staðin hækka veitingarnar næstu ferð 1. januar 2022. Fyri landskassan merkir hetta eina sparing á uml. 250 tús. kr.

Tekniskar broytingar

Ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Broytingarnar hava bara óbeinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Tá landið rindar minni út í skattskyldugum veitingum, tá verða skattainntøkurnar hjá kommununum eisini lægri. Talan er tó um eina sera avmarkaða upphædd.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið. Frameftir verða tvey ymisk sløg av tillagaðum størvum. Harumframt er frammanundan ein skipan við vardum størvum, sum er ein triðja skipan til sama persónskara.

Uppskotið hevur eisini við sær nakrar umsitingarligar ásetingar, sum lætta um í nøkrum málum, sum vísa seg at vera umsitingarliga tung.

KT-skipanin hjá Almannaverkinum skal tillagast, og hevur tað nakað av útreiðslum við sær.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Treytirnar fyri arbeiðsgevarar, sum hava starvsfólk í tillagaðum starvi, verða óbroyttar, og uppskotið hevur sostatt ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Umleið 50-55 persónar, sum eru í tillagaðum starvi, fara at fáa lægri lønarískoyti. Lønarískoytið lækkar úr 0 til góðar 2.000 kr. um mánaðin (skattskyldug veiting). Talan er lutvíst um persónar, sum hava høga sáttmálaløn, og sum tí fáa høgt lønarískoyti og lutvíst um persónar, sum hava heilt lágt arbeiðsføri, sum tí fáa høgt lønarískoyti.

Persónar, sum frameftir fara at fáa játtað tillagað starv, fara at fáa lægri lønarískoyti enn eftir higartil galdandi reglum. Fyri eini 60% av teimum, sum koma í tillagað starv, fer broytingin ikki at fáa fíggjarligar avleiðingar, tí hesi 60% fara at fáa vanliga sáttmálaløn. Restin fara at fáa nakað lægri lønarískoyti. Skattskyldugu inntøkurnar hjá persónum í tillagaðum starvi fara frameftir at vera úr uml. 21.000 kr. um mánaðin upp til knappar 43.000 kr. (hetta er løn og lønarískoyti tilsamans).

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki við sær revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur til likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til aðrar landsstýrismenn ella aðrar stovnar hjá landi ella kommunum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til nr. 1, 2, 7, 9, 10, 14, 15 og 16
Broytt tilvísing og konsekvensbroytingar í sambandi við at nýggja lógin um almannatrygd og tænastur verður sett í gildi, samstundis sum forsorgarlógin verður sett úr gildi.

Til nr. 3, 4 og 6
Heldur enn at vísa til hægstu dagpeningaveiting, verða veitingar frameftir ásettar sum prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting. Hægsta uppihaldsveiting verður ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Upphæddin verður neyvt tann sama sum hægsta dagpeningaveiting, og sjálv veitingin verður tí óbroytt, tá hendan lógin verður sett í gildi.

Stk. 3 ásetir eisini, at sambúgvandi er persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni. Talan er um óbroytta orðing í mun til galdandi lóg.

Til nr. 5
Hetta er ein broyting av tekniskum slag. Talan er um umorðing, sum einans hevur til endamáls at einsrætta málið í almannalóggávuni. Ásetingin í § 12, stk. 4 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og ásetingin í § 15, stk. 2 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur hava sama endamál. Ásetingin er tillagað soleiðis, at hon málsliga líkist ásetingini í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Broytingin fer ikki at broyta higartil galdandi praksis.

Til nr. 8
Teknisk broyting.

Til nr. 11 - § 22, stk. 1
Hægst møguliga lønarískoyti er 18.552 kr. um mánaðin. Aftrat hesi upphædd kann kemur frítíðarløn og eftirlønargjald sbrt. løgtingslóg um eftirløn. Av lønarískoytinum rindar Almannaverkið eisini arbeiðsgevarans part av arbeiðsmarknaðargjøldum. Hetta skal eisini leggjast aftrat teimum 18.552 kr.

Til nr. 11 - § 22, stk. 2
Parturin, sum arbeiðsgevarin rindar, sum er løn fyri metta arbeiðsavrikið í tímum, er løn sbrt. viðkomandi sáttmála á arbeiðsmarknaðinum. Í mun til løn frá arbeiðsgevara er sostatt talan um starv sbrt. vanligum treytum á arbeiðsmarknaðinum.

Við hesi skipan verður lønarískoytið, sum tað almenna veitir, broytt í mun til verandi tillagað støvr. Upphæddin, sum tað almenna rindar, verður broytt frá at vera ein upphædd sbrt. sáttmála til eitt lønarískoyti, ásett við lóg.

Lønarískoyti er stuðulsupphædd, sum verður veitt sum endurgjald fyri minkaða arbeiðsførleikan, eins og gjørt verður, tá persónur við varandi óarbeiðsføri fær fyritíðarpensjón.

Til nr. 11 - § 22, stk. 3
Hægsta lønarískoyti verður veitt, tá arbeiðsgevari rindar 2.000 kr. um mánaðin í løn. Lønarískoytið verður lækkað við 40% av inntøku frá arbeiðsgevara, sum er hægri enn 2.000 kr. T.d. um løn frá arbeiðsgevara er 12.000 kr., tá lækkar lønarískoytið soleiðis:

40% av (12.000 minus 2.000) = 4.000 kr.

Lønarískoytið lækkar sostatt við 4.000 kr. – úr 18.552 kr. niður til 14.552 kr.

Til nr. 11 - § 22, stk. 4
Løn og lønarískoyti kann tilsamans ikki vera hægri enn løn sbrt. viðkomandi sáttmála. Ein persónur kann við sáttmálaløn á 25.000 kr. ikki fáa løn og lønarískoyti, sum er hægri enn hendan upphæddin.

Dømi
Ein persónur við sáttmálaløn á 25.000 kr. um mánaðin hevur inntøku frá arbeiðsgevara á 12.000 kr. Tá lønin frá arbeiðsgevara er 12.000 kr., hevur hann rætt til lønarískoyti á uml. 14.550 kr. Tilsamans gevur hetta eina inntøku á 26.550 kr. Lønarískoytið verður í hesum føri lækkað við 1.550 kr., soleiðis at inntøkan er samsvarandi sáttmálaløn.

Eisini er ásett, at løn og lønarískoyti tilsamans ikki kann vera hægri sáttmálaløn, samsvarandi við starvsbrøkin, sum viðkomandi arbeiddi frammanundan. Hetta merkir, at ein persónur, sum vanliga hevur arbeitt niðursetta tíð – eisini áðrenn viðkomandi gjørdist sjúkur - ikki kann fáa hægri inntøku, tá viðkomandi er í tillagaðum starvi. Um persónurin vanliga hevur arbeitt við starvsbrøki 0,5, tá kann sáttmálaløn í tillagaða starvinum ikki ásetast hægri enn til starvsbrøk 0,5.

Til nr. 11 - § 22, stk. 5 og 7
Óbroyttar ásetingar.

Til nr. 11 - § 22, stk. 6
Tá lønarískoytið er lægri enn 1/5 av hægst møguliga lønarískoyti fellur lønarískoytið burtur. Hægst møguligt lønarískoyti er 18.552 kr. 1/5 av 18.552 kr. er 3.710 kr. Tað merkir, at tá ein persónur hevur løn frá arbeiðsgevara á umleið 39.100 kr., dettur lønarískoytið burtur.

Til nr. 11 - § 22, stk. 8
Áseting um javning.

Til nr. 12 og 13
Tað er Almannaverkið, sum ásetir lønarískoytið við støði í væntaðari inntøku frá arbeiðsgevara. Lønarískoytið verður ásett fyri 12 mánaðir í senn. Almannaverkið hevur eftirlit við, at lønarískoytið samsvarar við ta løn, sum arbeiðsgevarin rindar og lønarískoytið. Vísir tað seg, at samsvar ikki er ímillum løn frá arbeiðsgevara og lønarískoytið, verður lønarískoytið ásett av nýggjum, eisini í einum 12 mánaða tíðarskeiði. Ein møgulig skeivt útgoldin upphædd, sum stavar frá, at borgari ikki hevur arbeitt, tað, sum liggur til grund fyri lønarískoytinum, verður tí ikki eftirregulerað.

Lønarískoyti verður rindað beinleiðis til persón í tillagaðum starvi, og av lønarískoytinum rindar Almannaverkið eftirlønargjald, frítíðarløn og arbeiðsmarknaðargjøld eftir galdandi reglum.

Tað er ein treyt fyri at fáa lønarískoyti, at arbeiðstakarin er í framhaldandi starvi, og at Almannaverkið hevur eftirlit.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Ásett er, at persónur, sum er í tillagaðum ella vardum starvi, tá henda lóg verður sett í gildi, kann halda fram við somu treytum. Tó verður hægst møguliga lønarískoyti ásett til 19.900 kr. Somuleiðis verður lønarískoytið umsitið sbrt. reglunum í § 23, stk. 2 og 3.

Heimildin fyri gomlu vardu størvini hevur higartil verið í skiftisreglu í forsorgarlógini. Forsorgarlógin fer úr gildi um ársskiftið, og er heimildin tí flutt yvir í reglurnar um arbeiðsfremjandi tiltøk. Reglurnar um vard størv fóru úr gildi í 2013 og ístaðin komu nýggjar reglur um tillagað starv. Tað eru framvegis áleið 50 persónar, sum eru í vardum starvi sbrt. gomlu reglunum.

Harumframt er ásett, at um persónur er í tillagaðum ella vardum starvi sbrt. skiftisregluni í stk. 2, og fer í annað ella nýtt tillagað starv, so verður tað at viðgera eftir nýggju reglunum.

Almannamálaráðið, 29. september 2020.

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur